Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Virðisøking, nýskapan og menning og aðrar treytir í avgerðum um vinnuligar royndir og verkætlanir

Spurningar:

1. Hvørjar eru tær skjalfestu grundgevingarar um virðisøking, nýskapan og menning í teimum játtanum, ið eru givnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, herundir játtan til ítøkiligt skipakeyp?

2. Hvussu er grundgivið og skjalfest, at tær kvotujáttanir, ið eru givnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, harundir til ítøkiligt skipakeyp, eru tær, ið hava mest virðisøking, nýskapan og menning, soleiðis sum ásett er í kunngerð og tilhoyrandi skjølum?

3. Hvussu er skjalfest, viðgjørt og grundgivið, at tær verkætlanir, ið eru játtaðar, harundir til ítøkiligt skipakeyp, lúka treytirnar í viðmerkingum til lógina um, at øll lið í virðis- og framleiðsluliðnum ikki hava eigarar, ið hava ræði á meira enn 8% av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær – og hvørjar eru hesar verkætlanir, ið als ikki hava tað?

4. Hvussu er staðfest og skjalprógvað, at tey, ið hava fingið játtan til ítøkiligt skipakeyp, hava lokið treytirnar um at hava keypssáttmála og fígging til ítøkiligt skip og at tey eru klár at byrja beinanvegin?

Viðmerkingar:
Í lóg, kunngerð og reglum, er høvuðskravið til umsóknir um játtan til vinnuligar royndir og verkætlanir, at talan er um menning, nýskapan og virðisøking.

Harumframt er greitt ásett í metingarskjali 2 í kunngerðini, at hesi høvuðskrøv og høvuðstreytir eru galdandi fyri at fyri at koma upp á tal til ítøkiligt skipakeyp:

1. Í hvønn mun verkætlanin er klár at føra út í lívið beinanvegin. Her verður serliga hugt eftir, hvørt umsóknin inniheldur:

a) skjalprógvaða avtalu um ítøkiligt skipakeyp,
b) játtan at fíggja skipakeypið og neyðuga rakstrarfígging,
c) rakstrarætlan, ið ber seg fíggjarliga við minstu nøgdum, sum søkt verður um.

Tí verður spurt, hvussu hesi høvuðsatlit og hesar høvuðstreytir eru loknar í viðgerð og meting hjá Fiskimálaráðnum í játtanum, ið eru givnar.

Á Løgtingi, 28. september 2021

Høgni Hoydal